


Bassi vitjar á deildum okkara hesar dagar
við spennandi gávu og góðgæti til børnini.

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Fríggjadagin 22. august** | | **Mikudagin 27. august** | |
| 12.00 - 13.00 | Hvalba | 11.00 - 12.00 | Fuglafjørður |
| 14.00 - 16.00 | Tvøroyri | 12.30 - 13.30 | Gøta |
| **Mánadagin 25. august** | | 11.00 - 12.00 | Strendur |
| 12.00 - 13.00 | Hósvík | 12.30 - 13.30 | Skála |
| 13.30 - 14.30 | Norðskáli | 14.00 - 16.00 | Runavík |
| 15.00 - 16.00 | Eiði | | |
| | | **Hósdagin 28. august** | |
| 12.00 - 13.00 | Vestmanna | 10.30 - 11.30 | Tinghúsvegur, Tórshavn |
| 13.30 - 14.30 | Kvívík | 11.45 - 12.45 | Hornabø, Tórshavn |
| 15.00 - 16.00 | Kollafjørður | 13.00 - 17.00 | Miðbýurin, Tórshavn |
| **Týsdagin 26. august** | | **Fríggjadagin 29. august** | |
| 12.00 - 13.00 | Sørvágur | 13.30 - 14.30 | Skopun |
| 13.30 - 14.30 | Miðvágur | 15.00 - 16.00 | Sandur |
| 15.00 - 16.00 | Sandavágur | | |

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ

# Øll hava eina góða síðu - pop.fo hevur 100

# Brúktir bilar hjá Wenzel Petersen

| | |
|---|---|
| **Ford Mondeo 1.8 TD stw.** Bláur, aug. 95, km. 180.000 **kr. 70.000** | **Ford Mondeo ST200 2.5i V6** Bláur, 2000, km. 37.000 **kr. 229.000** |
| **Ford Escort 1.8 Diesel** Svartur, aug. 95, km. 120.000 **kr. 65.000** | **Ford Focus 1.8 Tdi** Silvur, 1999, km. 103.000 **kr. 137.000** |
| **Ford Mondeo 1.8 TD** Brúnur, 1997, km. 76.000 **kr. 110.000** | **Daewoo Nubira 2.0i Stw.** Grønur, 1998 **kr. 84.000** |
| **Ford Mondeo 2.0i Expressive** Silvur, des. 98, km. 91.000 **kr. 119.000** | **Toyota Yaris 1.3i Terra/sol** Grønur, 2001, km. 26.000 **kr. 122.000** |
| **Ford Escort 1.8 D 5 hurðar** Vínreyður, 1992, km. 184.000 **kr. 35.000** | **Ford Transit 2.5 TD** Silvur, 1997, km. 101.000 **v/mvg kr. 98.000** |
| **Ford Mondeo 1.8 TD** Brúnur, 1997, km. 115.000 **kr. 110.000** | **Mazda 626** Hvítur, 1990, km. 280.000 **kr. 26.000** |
| **Ford Escort 1.3 3 hurðar** Brúnur, 1995, km. 157.000 **kr. 49.000** | **Nissan Primera Diesel** Reyður, 1995, km. 140.000 **kr. 75.000** |
| **Fiat Punto** Ljósabrúnur, 1999, km. 60.000 **kr. 85.000** | **Ford Focus Ghia 1.6** Gráur, 1999, km. 26.000 **kr. 135.000** |
| **Toyota Corolla 2.0 Diesel Van** Bláur, 1997, km. 144.000 **v/mvg kr. 79.000** | **Ford Focus 1,6 Trend** Bláur, 1999, km. 77.000 **kr. 128.000** |
| **Suzuki Baleno 1.3i 4 hurðar** Bláur, 1997, km. 69.000 **kr. 58.000** | **Ford Focus 1,6** Lilla, 1999, km. 80.000 **kr. 120.000** |
| **Skoda Fabia 5 hurðar** Grønur, 2001, km. 16.000 **kr. 99.000** | **Ford Escort TD** Grønur, 1995, km. 246.000 **kr. 57.000** |
| **Citroen ZX Turbo Diesel** Bláur, 1997, km. 175.000 **kr. 69.000** | **Toyota Corolla 1.3 Aut.** Grønur, 1997, km. 117.000 **kr. 75.000** |
| **Ford Fiesta 1.8 Diesel** Bláur, 1995, km. 203.000 **kr. 39.000** | **Fiat Bravo 1.8** Reyður, 1996, km. 140.000 **kr. 70.000** |
| **Ford Escort 1.8 Diesel** Svartur, 1995, km. 128.000 **kr. 45.000** | **Ford Sierra 1.8 TD Sedan** Vínreyð., 1991, km. 248.000 **kr. 28.000** |
| **Ford Focus 1.8 Tdi Ghia** Silvur, 2000, km. 47.000 **kr. 148.000** | **Ford Mondeo 1.8 TD Stw.** Vínreyð., 1996, km. 203.000 **kr. 85.000** |
| **Daewoo Nubira 2.0i CDX** Grønur, 2002, km. 17.000 **kr. 139.000** | **Ford Escort 1.6i Tuscany** Vínreyður, 1992 **kr. 68.000** |

**Upplatingartíðir:**
mán-frí 8.00-17.30
leyg 10.00-15.00

**Vit síggjas hjá:**
Ford P/f Wenzel Ford
Akranesgøta 5 • 100 Tórshavn • tel. 354500/ fax 354501
www.wenzel.fo

ítróttur
Nr. 155 • mikudagur • 20. august 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Henrik og Jógvan Martin tvey ár afturat

**Á middegi í gjár skrivaðu FSF og venjarin og hjálparvenjarin undir nýggja samstarvsavtalu**

LANDSLIÐSVENJARIN
*Jóannes Hansen*

Fótbóltssambandið vil ikki hava, at støðan, sum føroyskur fótbóltur var í fyri tveimum árum síðani, skal endurtaka seg. Tá ið Allan Simonsen hevði boðað frá, at hann ikki fór at halda fram sum venjari, gekk rúm tíð, áðrenn tað var greitt, hvør skuldi standa við stýrisvølin.

Sáttmáli varð undirskrivaður við Henrik Larsen. Talan var um sáttmála, sum fevndu um hesa EM undankappingina. Sáttmálaskeiðið verður liðugt, tá ið Føroyar hava spælt síðsta undankappingardystin, sum verður á heimavølli ímóti Litava mikudagin 10. september.

Á tíðindafundi á middegi í gjár varð boðað frá, at semja er millum FSF og Henrik Larsen um at leingja samstarvið við teimum árum. Tað vil við øðrum orðum siga, at Henrik Larsen verður venjari hjá landsliðnum í HM undankappingini, sum verður á skránni á heysti í 2004 og í 2005.

Samstundis varð boðað frá, at Jógvan Martin Olsen eisini tvey tey næstu árini verður hjálparvenjari hjá landsliðsvenjaranum. Jógvan Martin Olsen er rættiliga gamal í garði. Hann var hjálparvenjari hjá Allani Simonsen frá 1996 og fram til og við 2001, og nú hevur hann arbeitt saman við Henrik Larsen í tvey ár.

– At vit vilja leingja samstarvið við venjaran og hjálparvenjaran ber boð um, at vit hava verið stak væl nøgdir við arbeiðið, sum teir hesi bæði seinastu kappingarárini hava lagt í landsliðið. Henrik Larsen kom sjáldsama skjótt og lætt inn í føroysk viðurskifti, og hann hevur samstundis megnað at sett sín persónliga dám á menningina av landsliðnum, sigur formaðurin í FSF, Dánial Andreasen, og hann heldur fram:

– Samstarvið við Jógvan Martin Olsen hevur verið skjótt í átta ár. Jógvan Martin hevur í uppaftur væl fleiri ár havt ábyrgdina av yngru landsliðunum, og tað er neyvan nakar, sum kennir føroyskar fótbóltsspælarar og teirra møguleikar í altjóða høpi betri, enn Jógvan Martin Olsen ger tað. Hann arbeiddi væl saman við Allani Simonsen, og heldur ikki Henrik Larsen hevur fjalt yvir, at hann hevur verið fegin um samstarvið við føroyska hjálparvenjarin, sigur Dánial Andreasen.

## Framvegis nýggir møguleikar

Tá ið Henrik Larsen skrivaði undir sáttmála við FSF fyri hálvum øðrum ári síðani, segði hann eitt sindur bragdliga, at málið í hesi EM undankappingini var at fáa sjey stig. Undan trimum teimum síðstu dystunum er eitt stig á kontini. Men landsliðsvenjarin hevur fleiri ferðir sagt, at talan hevur verið um sera positivt tíðarskeið, har føroyska liðið sum oftast hevur roynt at spæla fótbólt í staðin fyri at sparka, og har marginalirnir fleiri ferðir hava verið ímóti. Her verður eitt nú hugsað um heimadystin ímóti Skotlandi, har tað var gyltur møguleiki at økja til 3-0, útidysturin í Týsklandi, har royndin hjá Hjalgrím Elttør í síðstu løtu var stólpa út í staðin fyri stólpa inn, og útidysturin í Reykjavík, har javnleikurin í evstu løtu gjørdist til 2-1 tap.

Henrik Larsen metir, at tað framvegis eru góðir møguleikar fyri betri spæli og fyri, at marginalirnir onkra ferðina fara at vera í parti við føroyska liðnum. Hann er stak fegin um samstarvið við FSF og við Jógvan Martin Olsen. Harvið tykist tað vera soleiðis, at tað verður friður um venjaraspurningin fram til og við 2005.

Jógvan Martin Olsen skal arbeiða fyri FSF eftir somu treytum, sum hann hevur gjørt higartil. Tað vil siga, at hann umframt at vera hjálparvenjari hjá Henrik Larsen verður høvuðsvenjari hjá yngru landsliðunum. Tvey tey seinastu árini hevur Jógvan Martin Olsen verið venjari hjá NSÍ í 1. deild. Fótbóltssambandið hevur einki ímóti, at Jógvan Martin Olsen eisini komandi árini verður venjari hjá føroyskum feløgum.



*Henrik Larsen og FSF eru komin ásamt um ein nýggjan tvey ára sáttmála. Her er hann til venjing á Tórsvølli mánakvøldið. Hjálparvenjarin Jógvan Martin Olsen skal eisini standa honum við lið komandi tvey árini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Blatter í býnum

**FIFA formaðurin, sum steðgar í eitt samdøgur, verður við, tá ið FSF seinnapartin fer at hava almenna móttøku, og hann verður millum áskoðararnar ímóti Íslandi**

FORKUNNUG FÓTBÓLTSVITJAN
*Jóannes Hansen*

Fyri fyrstu ferð í søguni fer hægsti maður yvirhøvur í fótbóltsheiminum í dag at seta fótin á føroyska jørð. Fyrrapartin kemur Joseph Blatter, sveisiski formaðurin í altjóða fótbótssamgonguni, FIFA, í Vágar, og hann steðgar eitt samdøgur her á klettunum. Dánial Andreasen, formaður í Fótbóltssambandinum, fer at taka ímóti Sepp Blatter, og Dánial fer at vera vertur hjá FIFA bossinum alla tíðina, meðan hann verður í Føroyum.

Blatter verður við, tá ið FSF seinnapartin í dag kl. 14 fer at hava almenna móttøku í sambandi við at FSF húsið verður tikið alment í nýtslu. Fótbóltssambandið hevur fingið ein fittan part av fíggingini til nýggju húsini frá FIFA. Umframt Sepp Blatter og Dánial Andreasen fer eisini formaðurin í íslendska fótbóltssambandinum, Eggert Magnussen, at siga nøkur orð. Eggert er nevndarlimur í europeisku fótbóltssamgonguni UEFA, og tað verður sum umboð fyri UEFA, at hann fer at bera heilsu fram seinnapartin í dag.

Sepp Blatter verður sjálvsagt heiðursgestur í sambandi við dystin ímóti Íslandi í kvøld. Ætlanin er, at FIFA formaðurin saman við KSÍ formanninum og FSF formanninum skal heilsa upp á spælararnar, áðrenn tað verður farið undir sjálvan dystin.

FIFA bossurin fer at hava tíðindafund í FSF húsinum kl. 15.30 í dag. Eftir at hann er komin á Hotel Hafnia verður farið til morgunmatar í móttøkuhúsinum hjá Tórshavnar kommunu, og beinanvegin eftir at síðsta brikslið hevur verið í EM undankappingardystinum verður farið til Kirkjubøar, har Landsstýrið bjóðar døgurða.




Vitja eisini okkara nýggja handil á
www.maersk-air.fo
MAERSK AIR
It's got to be perfect
Handilskjarnin, 100 Tórshavn · Telefon 35 74 74 · Telefax 35 74 75